# Finn rætta litin og rætta stílin

Hevur tú trupulleikar við at keypa klæðir, ið hóska til tín kroppsbygna? Ivast tú í, hvørjir litir klæða tær best? Ert tú ein heit ella køld typa? Hvussu við brillum, hári og prýðislutum?

Aftaná ein myrkan og kaldan vetur fáa vit hug at gera okkurt nýtt við okkum sjálvi. Vár-summarmótin 2007 er í hæddini, og nógv nýtt er komið fram. Nýggir litir og snið við spennandi tilhoyri. Ynskir tý at vita meir um, hvat tú klæðir best av øllum tí nýggja, so kanst tú fara til lit og stíl ráðgeving. Tað er Lydia Petersen hjá Lit & Stíl í Klaksvík, sum veitir hesa tænastu.

Her kanst tú m.a. fáa persónliga vegleiðing um lit og stíl. Vilt tú hava eitt make-over, so ber hetta eisini til. Lydia leggur nevniliga make-up og vegleiðir tær í røttum litum til make-up. Sum hárskeri kann hon harafturat klippa og seta hárið, so tað passar til títt andlitsskap.

Lit og stíl vegleiðing er bæði til einstaklingar og bólkar. Til ber eisini at bíleggja fyrilestrar.



*Lydia Petersen í Lit & Stíl í Klaksvík kann geva tær persónliga vegleiðing um lit og stíl, sum passar tær*



















